# Breiðbands kollvelting ávegis í Føroyum



**Finn Helmer eitur maðurin, og hann sigur seg kunna syrgja fyri einari breiðbandsloysn til allar føroyingÅar, sum er 4000 ferðir skjótari enn tann vit hava í dag.**
**– Breiðbandið føroyingar hava í dag er avoldað, og tað er ikki bara galdandi fyri føroyskt breiðband, men allastaðni aðrastaðni við, sigur Finn Helmer í samrøðu við Sosialin**

BREIÐBAND

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Sum tað framgongur aðrastaðni á síðunum, so er Finn Helmer ikki hvør sum helst. Tá hann setir sær eitt mál, so vil hann gera alt fyri náa tí. Nú kann hann gott hugsa sær, at føroyingar skulu hava breiðband, sum er fleiri túsund ferðir skjótari enn tað, vit hava í dag, og við tí í huganum, hann hevur fingið av skafti aðrastaðni, er tað als ikki óhugsandi, at tað gerðst veruleiki.

Tað, Finn Helmer hevur ført fram í fleiri ár eftir hondini, er, at telefonfyritøkurnar tveita pengar út í gjøgnum vindeyga við, at framvegis royna at umvæla og varðveita gomlu koparkáplarnar, sum alt fjarskiftissamband í dag er grundað á.

- Tað er eitt risa mistak, at vit áhaldandi halda fast um avoldaðu tøknina, sum telefyritøkurnar brúka, sigur Finn Helmer. Áður hevur Finn Helmer sagt, at TDC í Danmark átti at gravað allar koparkáplarnar upp og selt teir sum gamalt jarn. Tað sigur ikki lítið um hugburð hansara mótvegis tøknini, sum telefonfyritøkurnar brúka.

Hevði tað staðið til hansara, vóru allir gamlir koparkáplar langt síðani skræddir upp, og í staðin hevði hann lagt fipurnet niður. Fipurnet, sum millum annað tryggjar tær alnótarsamband, ið er 4000 ferðir skjótari enn vanligt ADSL-sambandi, sum vit dagliga brúka. Talan er um 10 gigabit breiðband.

> ” *- Verður fipurnet lagt kring alt landið, hava vit tikið eitt risa fet rætta vegin, tí tá verða Føroyar ikki millum heimsins fremstu lond á økinum, men Føroyar verða langt fremst í deildini*

Sum eitt dømi um ótrúligu ferðina hetta breiðbandið hevur, so kunnu vit nevna, at ein sera vælútgjørd skrivstova hevur í dag eitt innanhýsis net, sum arbeiðir við eitt gigabit ferð. Finn Helmer vil hava, at vit skulu hava eitt alnetarsamband heima við hús, sum er tíggju ferðir so skjótt sum tað.

### Kostar ein undirsjóvartunnil

Men alt kostar pengar, og tað ger fipurnet so sanniliga eisini. Tí hevur Finn Helmer eisini mangan argast inn á, at tað ikki varð ásett við lóg fyri fimm árum síðani, at hvørja ferð gravað varð onkustaðni í Danmark, skuldi fipurnet leggjast í samstundis.

- Høvdu vit gjørt tað, hevði fipurnetið longu verið um helvtina av Danmark, og vit høvdu spart eina rúgvu av pengum. Nú mugu vit í staðin grava serliga fyri at leggja fipurnetið, og tað ger tað heila dýrari, sigur Finn Helmer.

Hann heldur at, at vit avgjørt ikki mugu lata okkum ræða av kostnaðinum.

- Her í Føroyum verða tunlar gjørdir alla tíðina og at leggja fipurnet fyri alt